



# »Musikkfest« í Frelsunnarherinum



HORNORKESTUR
*Heri Simonsen*
*heri@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*





Í samband við, at Hornorkestur Frelsunarhersins í Havn fylti 75 ár, var eitt stórfingið tónleikatiltak í hølunum hjá Frelsunarherinum í Havn.

Á skránni vóru bæði gomul og væl kend løg, sum Hornorkestur Frelsunarhersins hevur spælt gjøgnum árini. Men nýggjari løg vóru eisini framførd. Áhugaverdar gamlar myndir og søgubrot frá hesum farnu 75 árunum vóru eisini vístar á stórskíggja. Talan gjørdist um eina minniliga løtu í salinum hjá Frelsunarherinum, sum var stúgvandi fullur við fólki.

Heitið á tiltakinum var "Musikfest", sum er eitt heitið, sum stavar frá tí tætta samstarvinum Frelsunarherurin í Føroyum hevur havt við Frelsunnarherin í Noregi hesi mongu árini.







